

*Lone cowboys. Tukktukkin hjá Eyðun og Joey í ómetaliga vakra fjallalendinum í Andes*

– Tað tók okkum næstan tveir dagar at koma til saltoyðimørkina. Bara leiðin til sjálva saltoyðimørkina var so hørð, at tað nærum tók ondina úr summum okkara. Vegurin var avgjørt ikki gjørdur til eina tuktuk, kilometur eftur kilometur av sandi og avgjørt einki annað. Bakandi sól og aftur og fram at skumpa, lyfta og toga, 11 tímar tók tað út í eitt i at koyra teir bert umleið 40 kilometrarnar, greiðir Eyðun frá.

## Sluppu ikki inn í Argentina

Í øllum hesum sandinum vóru hundraðvís av smáum tornadoum at síggja so

langt sum eygað rakk, og teir sluppu eisini at koyra beint ígjøgnum eina, sum teir hildu var fantastiskt.

– Tá vit langt um leingi vóru komnir yvir harða stríðið og høvdu sovið væl, gekk leiðin gjøgnum heimsins største saltøki. Frá einum enda í annan tók tað okkum seks tímar at koyra. Hetta var avgjørt eitt av hæddarpunktunum á túrinum, heilt fantastiskt. Tú sært bara kritahvítt so langt sum eygað sær. Í saltoyðimørkini er nógv arbeiði, meginparturin til útflutnings, og vit máttu entá spyrja um veg hjá einum av arbeiðaranum har, sigur Eyðun.

Eftir at hava koyrt gjøgnum saltoyðimørkina komu teir upp í fjøllini. Nú var tað sandur og runa og nógvur vindur, men regni sluppu teir undan.

Fjallakoyringin fór eisini illa við tuktukkunum, og teir slitu ketur í heilum. Teir máttu improvisera og skoyta keturnar umaftur og umaftur, tannhjólini vóru boygnað, men at enda fingu teir ein mekanikara at umvæla.

Einaferð koyrdu teir eisini skeivt einar 30 kilometrar, og hildu beint móti argentinska markinum heldur enn paraguayska.

– So vit royndu at kroysta okkum inn um markið við okkara tuktuks. Vit stemplaðu okkum út úr Bolivia og inn í Argentina, men tá vit so skuldu stempla okkara tuktuks inn, høvdu vit ikki røttu eigaraskjølini upp á tær, eingi skjøl, sum søgdu, at vit høvdu loyvi at koyra teir. Tollurin í Peru til Bolivia hevði givið okkum skeiv skjøl, so nú høvdu vit knappliga ólógligar tuktuks við okkum, sigur Eyðun.

So inn aftur í Bolivia, men eisini tá vóru trupulleikar, so vit sótu sum kánus sum í ongamannalandi. Eftir drúgvar samrøður og hjálp frá stigtakarunum sluppu vit loksins innaftur í Bolivia og síðani við fullari ferð móti paraguayska markinum.

## Ólíðiligur hiti

Sjálvt um marknaðarvaktirnir undraðust á, at teimum varð bannað atgongd inn í Argentina, so gekk tó væl at koma inn í Paraguay. Og við hesum skifti landslagið eisini.

– Eftir at hava koyrt í fjallalendi og á sandi, var alt nú knappliga gras og skógir við risatrøum. Vit kavaðu eftir einum degi úr 4000 niður í 1000 metra hædd, og hitin var øgiligur, sigur Eyðun Thomsen.

Veðurumskiftið var munandi, og frá at verða í fleiri løgum av klæðum og vøttum, koyrdu teir nú í shorts og T-shirtum, og hitin rakk heilt upp í 55 stig.

Tá vit komu til markið til Paraguay var eitt verri skil. Fólk byrjaðu at dehydrera, høvdu onga orku og fingu ikki luft, og tá vit koyrdu avstað, var tað sum ein hárturkari hekk beint framman fyri og blásti heita luft í andlitið. Frá markinum til næsta bý tók einar seks-sjey tímar, og har var hvørki matur ella drekka, og eingin verja fyri sólini, sigur Eyðun Thomsen.

Nú var asfalt at koyra á, men hetta var kortini so heitt, at tað voldi aðrar trupulleikar, og skjótt so brustu dekkini av hitanum.

– Vit endaðu dagin í bilskúrinum hjá einum mekanikara. Vit høvdu brúkt allar eykalutirnar, og tí var einki annað at gera enn at sleipa, slitnaði ein keta. Serliga í The Grand Chaco í Paraguay, ið veruliga er ongamannaland, gekk alt galið, og í øllum hitanum, ið var, kundi tað ikki verði verri, sigur Eyðun Thomsen.

## 8 av 62

Hetta førdi so til, at teir avgjørdu ikki at koyra um dagin meira, men bert um morgunin, kvøldið og náttina.

– Trupulleikin um náttina var sjálvandi, at um eitt hjól brast ella ein keta slitnaði, var so bølamyrkt, og tendraði tú lyktina, varð tú undirdýktur í túsundtals flogkyknum. Heldur ikki skorpiónum sluppu vit undan, sigur Eyðun Müller Thomsen.

Dagin eftir var tað beina kós og við fullari ferð eftir landsvegnum allan vegin til Asuncion, høvuðsstaðin í Paraguay, har teir komu klokkan 17.30 sunnudagin 22. november.

– Vit funnu eitt hotel, parkeraðu okkara tuktuk framman fyri einum svimjihyli og lupu so útí, sigur Eyðun.

Ferðin strekti seg tilsamans 4.436 kilometrar úr Huancayo í Peru til Asuncion í Paraguay, og tók teimum báðum 22 dagar at koyra. Og hetta er fyrstu ferð, at nakar hevur koyrt strekkið á einari tuktuk.

– Vit hava upplivað alt frá gróti, kava, sandi, salti, runu, frumskóg, tornadoum, sandstormi, storum áum, asfalti, í lastbili og hvat man enn kann hugsa sær, sigur Eyðun.

Tað eru fleiri ræðusøgur frá túrinum, millum annað tá tuktukkin endaði í einari stórari á, onkur annar kom so illa til skaða, at hann bleiv flogin beinleiðis heim til Onglands.

– Men fyri okkum – banka undir borðið – hevur alt gingið super, hóast tað hevur verið mega strævið leggur ein glaður og íðin Eyðun aftrat.

Av teimum 62 pørunum, sum byrjaðu túrin, gjøgnumførdu bert tey 8, og harímillum Joey og Eyðun Müller Thomsen, sum nú hevur upplivað sína dreymaferð á tuktuk um Andesfjøllini. Eyðun og Joey vóru næsta parið, sum kom á mál.

Ferðin varð gjørd í samstarvi við hjálparfelagsskapin Operation Smile. Hvørt luttakandi parið skuldi rinda 10.000 kr. til arbeiðið hjá felagskapinum, sum m.a. er at skurðviðgera børn við haruskári. Mong hava stuðlað ferðini, einstakligar, feløg oo. Eitt nú hevur heimasíðan hjá ungdómsblaðnum MESS verður høvuðsstuðul. Aðrir sponsorar hava verið Førarasetrið, har Eyðun tók koyrikortið til tuktuk, Sosialurin, Rás2, Expert oo.

Eyðun Müller Thomsen letur heilsa úr Suðuramerika og takkar øllum fyri stuðulin. Hann hevur tað gott og fer nú at uppliva aðrar partar av Suðuramerika.



*Tukktukkin í saltoyðimørkini í Bolivia*



*Komnir til skógarøki í Paraguay*




*Málið í Asuncion. Joey og Eyðun 1 og 2 fv.*